# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Hvat gera vit so?

Tað stendur nógv á ymsa staðni innan tað almenna, tá tað kemur til pengar. Vit hoyra dag og dagliga um akuttan tørv á pengum til ábøtur og rakstur. Skúlar, sjúkrahúsverk og flestu almennu tænasturnar vísa seg at mangla pengar. Hetta má merkja, at økið hevur fingið ov lítið av pengum til viðlíkahald og uppgradering seinnu árini.

Hvussu ber tað til? Vit hava havt metgóð ár nú í skjótt 10 ár, har vit hava havt so mikið av pengum á fíggjarlógini, at vit hava sent 366 milliónir um árið retur til donsku stjórnina. Hetta kom vanligi føroyingurin ikki at merkja, varð sagt. Hvussu ber so til, at útbyggingar innan skúla- og heilsuverk hava ligið á láni í allarbestu tíðum? Ein sovorðin peningatørvur, har alt skríggjar eftir pengum kemur ikki knappliga. At politikarar enn brúka kreppuna fyrst í nítiárunum sum undanførslu fyri forsømilsi av eitt nú skúlum, er ov bíligt, tá vit nú í eini 10 ár hava havt søguliga góðar uppgangstíðir.

Meiri áhugavert verður tað, tá politikarar úr øllum flokkum siga seg vilja koma blokkinum til lívs í næstu framtíð. Hvussu ætla teir at hetta skal røkkast, samstundis sum almenni raksturin alsamt økist, og íløgur í skúladeplar, universitet, granskaraparkir, altjóða flogvøll, tunlar o.s.fr. skulu gerast? Alt hetta fer at økja um almenna raksturin, ið ikki hongur saman uttan blokk í dag. Hann vísir seg at hanga somikið illa saman, at man hevur forsømt viðlíkahald og útbygging seinnu árini í allarbestu tíðum, har skattainntøkurnar ár um ár hava sett met. Hvussu skal so hesin rakstur kunna hanga saman uttan blokk um fá ár, tá skattinntøkurnar kanska ikki fara at seta met? Ætla politikarnir sær at spara á almenna rakstrinum komandi árini? Tað sær ikki soleiðis út við vallyftunum.

Her má onkur frágreiðing koma frá teimum politikarum, sum vísa seg at vilja blæsa og hava mjøl í munninum. Eitt minsta krav má vera at siga veljarum, hvussu raðfestast skal næstu árini, og hvar neyðugi inntøkuvøksturin skal koma frá, um blokkurin skal burtur. Sjálvandi skulu vit hava áræði og økja um okkara framleiðslu fyri í minsta lagi at koma upp á sama støði sum grannalondini, men tað er ov bíligt bara at halda áfram við ókritiskari danskari lógarkopiering við hartilhoyrandi øktum rakstrarkostnaði og skattasatsi, meðan tosað verður í luftigum vendingum um fuglarnar á takinum. Vit hava havt ymisk vinnufremjandi tiltøk í mong ár, og ikki kann sigast annað, enn at langt tykist vera ímillum úrslitini. Í hvussu so er, so má bara staðfestast, at tað verður ein góð løta, áðrenn hesi tiltøk koma at geva góðar 600 milliónir um árið beint inn í landskassan, um nakrantíð. Hvat gera vit so? Tað er spurningurin, ið eigur at vera eitt høvuðsevnið til valið.

**Sosialurin**

## Hevur tú hugsað teg um?

Val

**SIRIÐ STENBERG**

Valevnið á lista E

Um nýggjárstíð lata vit ofta tankarnar leita aftur á árið sum fór, somuleiðis sum vit nýta høvi at hyggja frameftir.
Vónandi fer veljarin eisini at hugsa soleiðis til valið 19 januar. Vónandi fara tankarnir at leita aftur á hvørjir batar undanfarna samgonga hevur framt, eins og veljarin fer at spyrja seg sjálvan um hann heldur at brúk er fyri nýggjum hugsjónum á tingið.
Eg vóni, og vænti, at veljarin tann 19. januar hugsar seg væl um, og hevur tikið støðu til t. d.
- var tað ílagið at Miðnámsskúlin bleiv fluttur úr Vági, aftaná at uml 10 milliónir vóru brúktar til útgrevstur og annað?
- var tað ílagið at lovaða ellisheimið vit skuldu “fáa” saman við økisdeplinum fyri sinnisveik ikki bleiv til nakað?
- var tað ílagið at miðnámsskúlin, sum landi skuldi bera kostnaðin av, skuldi flytast fyri eitt røktarheim kommunurnar sjálvar skuldi gjaldað, soleiðis at borgarirnir í kommununum skulu gjalda rokningina uppa uml 70 milliónir. Vónandi hugsar veljarin eisini um hvørjar íløgur rúm verður fyri framyvir við so stórari skuld!
- var skattalættin til tey hægstløntu ílagið?
- var tað ílagið við mátanum Føroya Banki bleiv privatiseraður uppá?
- var handfaringin av uttanrikispolitisku heimildarlógini ílagið?
- eru fólkaskúla og miðnámsskúlaviðurskiftini ílagið í Føroyum?

Heldur tú, sum eg, at Føroyska samfelagið hevur brúk fyri ørðvísi hugsanum, so havi eg nøkur boð uppá hvat eg meti vera umráðandi at arbeiða fram ímóti
- at politiskar raðfestingar vera gjørdar í langtíðarætlanum, soleiðis at vit fáa ein yvirskipaðan politik í Føroyum, og ikki kostnaðarmiklar her og nú loysnir
- at arbeitt verður fram ímóti at betra um umstøðurnar hjá føroysku familjunum, soleiðis at børnini, sum eru okkara størsta tilfangið fáa betri sømdir
- at vit fáa ein yvirskipaðan útbúgvingarpolitik
- at okkara eldri borgarir fáa høvi til sjálvi at avgera hvussu tey vilja liva ellisárini, við tí hjálp tey hava fyri neyðini, sjálvandi
- at fremja batar á umhvørvisøkinum
- at fyribyrging og heilsufremjan vera raðfest frammaliga á heilsuøkinum
- at trygd og tilbúgving vera styrkt munandi

Nógv annað kundi verið at arbeitt við, hetta eru bert dømi 19 januar hevur tú møguleikan at siga tína hugsan!

**Gott nýggjár**

## Áheitan á kringvarpstjóran Jógvan Jespersen: Bíða við uppsøgnini

Val



**KÁRI P. HØJGAARD**

floksformaður

Tað kom óvart á okkum øll, tá Jógvan Jespersen boðaði frá, at hann hevur sagt seg úr starvinum sum stjóri fyri Kringvarpi Føroya.

At tú tók hetta stigið er tó skiljandi, tí umstøðurnar at virka undir, eru út av lagi vánaligar.

At arbeiðið við at savna Kringvarpi í Sortudýki ikki er komið longur ávegis og nú til seinast datt burtur, er einans landstýrismanninum og samgonguni, ið hevur havt politisku ábyrgdina, fyri at takka.

Stór frágongd er í manningini á Úf og SVF, vegna ótryggu framtíðarviðurskiftini hjá starvsfólkunum.

Vit hava ein millumbylgjusendara, ið er so gamal og vánaligur, at hann kann støðga nær tað skal vera, og eykalutir av hesum slag verða ikki framleiddir longur.

Somu trupuleikar kunnu eisini henda við høvuðssjónvarpssendaranum.

Sjálvstýrisflokkurin hevði ein høvuðsleiklut, tá almenna Útvarp Føroya sá dagsins ljós. Ongantíð meir enn í dag, er neyðugt við einum óheftum almennum Kringvarpi Føroya at tryggja tíðindaflutningin, og styrkja og varðveita føroyskt mál og mentan.

Kringvarpsgjaldið kann ikki hækkast meira enn tað er í dag. Tí má neyðuga peningaupphæddin til íløgur og rakstur koma á fíggjarlógina.

Kringvarpstjórin hevur gjørt eitt gott arbeiði og hevur nomið sær royndir í samanlagda stovninum. Tí er alneyðugt, nú framhaldandi kósin hjá Kringvarpi Føroya skal setast út í kortið av eini komandi samgongu, at politiski myndugleikin fær eitt virki mótspæl, ið greitt kann vísa á, hvat er neyðugt, fyri at vit framhaldandi kunnu hava eitt dygdargott alment útvarp og sjónvarp.

Tí er áheitan mín á Jógvan Jespersen kringvarpstjóra:

”Bíða við uppsøgnini”.

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Redaktiónsleiðari:** Kári Mikkelsen karim@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Birgir Waag Høgnesen birgir@sosialurin.fo
Joan Abrahamsen joan@sosialurin.fo
Henrietta Hammer henrietta@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Rólant Waag Dam rolant@sosialurin.fo
Niels Uni Dam nielsuni@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Dorit Hansen dorit@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydnaskaale@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Teitur Joensen teitur@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Ellebye Andersen alvin@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 og boða frá, leygardag tó frá kl. 11.00-13.00

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 13[30]

**Lýsingar**

| **Freistir:** | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.